# Ansvarlig kommunalpolitik

**Henning Christensen**
*valevni Javna›arfloksins til Tórshavnar b‡rá›*



Under valgkampen til byrådsvalget i Tórshavn kommune er der kommet et bredt spekter af emner, som de forskellige valgemner har skrevet om. Forhold der er kommunalt anliggende, og landspolitiske er inddraget i valgkampen. Torshavn kommune kan bruge op til et vist beløb i nye investeringer om året, dette indebærer, at ikke alt, som er draget frem i valgkampen kan realiseres her og nu, men fordeles over en periode inden for de, til enhver tid forsvarlige økonomiske rammer. Hvis jeg bliver valgt ind i byrådet 21. nov. vil jeg prioritere følgende opgaver:

**Børnehaver- og vuggestuer:**
Behovet for børnepasning må løses hurtigst muligt.

**Grundstykker:**
Mangelen på grundstykker, det være sig til private eller erhvervslivet må løses. Her har manglet planlægning.

**Boliger:**
Tilbudet om alternative boliger i Tórshavn kommune må fremskyndes. Det være sig ungdomsboliger – boliger til pensionister og enlige, og til folk, som ikke ønsker at bo i eget hus længere.

**Alderdoms- og plejehjem:**
Området er landspolitisk. Byrådet må påvirke lagting og landsstyre til at medvirke i en forøgelse af nuværende alderdoms- og plejehjemspladser i kommunen.

**Hjemmeplejen:**
Til personer under hjemmeplejen, hvor forligheden er nedsat, vil jeg medvirke til en kommunal ordning/tilskud i forbindelse med kørsel i taxa til læge og undersøgelser på sygehus med mere, et antal gange i kvartalet.

**Beskyttede boliger:**
Mangelen på beskyttede boliger i kommunen er stor, hvor stor vides ikke på nuværende tidspunkt. Der er dog ikke tvivl om, at der inden for sygehusområdet er flere indlagte, som godt kunne være udskrevet til en beskyttet bolig, såfremt disse var til stede.

**Kulturlivet og ungdommen:**
Tórshavn kommune må i samarbejde med kultur og ungdomsforeningerne skabe gode muligheder for deres aktiviteter.

**Bådejer:**
Der må skabes flere bådpladser kommunen. Der er oplyst, at flere hundrede står på ventelisten efter en bådsplads.

**Kolonihaver:**
Der må kunne fremskaffes flere tilbud til de borgere, som ønsker sig en plet, hvor de kan dyrke grønsage m.m. Eventuelt mulighed for at holde høns, gæs og ænder.

## VI‹MERKINGAR

# Er veljarin, blindur/deyvur ella b‡ttur?

**Schumann Hjaltalin,**
*b‡rá›slimur, valevni fyri Sambandsflokkin*

Nú vit koma nærri valdegnum, økist tr‡sti› fyri at sleppa inn um b‡rá›sgáttina. Ta› er onki mark fyri hvat ver›ur lova› av teimum ymisku valevnunum.

Ta› er ógvuliga hugstoytt at lesa og hoyra um alt hetta valgassi›, sum nú er frammi. Ta› er ovbo›i› vi› øllum hesum valfleskinum sum bor›reitt ver›ur vi› á tí polittiska sjálvtøkubor›inum. Onkur lovar tra›ir, annar 100 % barnaansing ein annar nærum gratis grundstykkir og n‡ggjar skúlar, bátabrúgvar, jazzhús og mangt anna›. Hetta er júst sum hjá Jacob Havgaard, sum lova›i umdanvind á súklubreytini, um hann var valdur, her er onki ø›rvísi.

Onki ver›ur nevnt um hvussu hetta skal gjaldast, hetta ver›ur bara gloymt ella fjalt, tí mett ver›ur helst at veljarin er bæ›i blindur, deyvur og helst b‡ttur.

# Óseriøs vallyftir

**Høgni Mikkelsen**
*Valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar B‡rá›*

Nú val er fyri framman, eru nógvar vælgreinar at lesa. Til dømis ver›ur skriva›, at ta› manglar bæ›i eitt og anna›. Skúlar, ellisheim, ítróttarhallir, barnagar›ar o.s.fr., og somulei›is ver›ur nógv skriva› um skattalætta.

Undan b‡rá›svali lesur man javnan um lyftir vi›víkjandi skattalætta.

Ta› er óseriøst eftir mínari meining, tí alt hetta merkir minni inntøku fyri Tórshavnar B‡rá›. Hetta er hóast alt høvu›sinntøkan, i› Tórshavnar B‡rá› hevur. Ta› hev›i veri› gle›iligt um skattalættin bleiv ein veruleiki, men so skulu a›rir bollar í suppuna.

Eg meini at kommunan skuldi roynt at fingi› meira fyri peningin enn hon ger í dag. Tá ta› er gjørt, kann man tosa um skattalætta.

Tá man skrivar um so vi›brekin mál, meini eg, at man skal vera meira seriøsur og ikki lova ov nógv, tá man stillar upp til b‡rá›sval.

# Heilbrigdi & Blákrossur

**Johan Mortensen**
*Valevni› hjá Tjó›veldisflokkinum*

Alkohol er ein stórur og vaksandi trupulleiki í okkara samfelag. Ta› ver›ur fari› ov lætt um alkohol. Vi› okkara batnandi búskapi økist tali av fólki vi› rúsevnistrupulleikum, ein syrgiligur veruleiki. Ávirka›i fólk í havnargøtum hoyra til b‡armyndna og at nógv fólk ikki hava tak yvir høvdinum ber Herbergi› hjá Frelsunarherinum sítt syndarliga prógv um. Alkohol kostar føroyska samfelagnum risaupphæddir og er mongum at bana.

Ta› má vera sera møtimiki› hjá stovnum sum Heilbrigdi og Blákrossi hvørt ár at skulu berjast vi› tvørar politikarar sum ikki vilja veita ney›ugu figgingina, men heldur skarva av einari frammanundan ov lítlari játtan. Somu politikarir sum ikki síggja naka› óført í at byggja marglætis Tinghús og at yvirbetala kanningarstjórum og umbo›smonnum og tí heilaga fótbóltinum.

Her skal sanniliga broyting í. Komandi B‡rá› hevur eina moralska skyldu at hjálpa nevndu stovnum. Eg havi sera stóra vir›ing fyri tí arbei›i sum Frelsunarherurin útinnir í Tórshavn. Frelsurnarherurin tørvar eisini eina hjálpandi hond frá komandi B‡rá›i.

Vit hava ikki vælfer› um ikki øll hava ta› gott.

Tjó›veldisflokkurin vil hjálpa.

# Hvør útstykking sín ansingarstovn!

**He›in Mortensen**
*b‡rá›slimur, sambandsvalevni til Tórshavnar b‡rá›*

Undan hesum b‡rá›svalinum hevur helst einki evni fingi› so stóra umrø›u sum barnaansingin, i› sjálvandi eisini er eitt av teimum størstu evnunum.

At so summi hava hug at taka patent upp á hetta evni, er stórt spell, tí neyvan hevur nakar í b‡rá›num sviki›, samstundis sum øll valevni tykjast vilja naka› á hesum øki.

Næstan ein fimtingur av fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fer til barnaansing, i› er størsta einstaka treytin fyri trivna› og liviligum korum hjá ungu barnafamiljunum í kommununi.

Sjálvandi eigur barnaansingin ikki at taka naka› frá ø›rum í kommununi, i› eisini hava brúk fyri teimum tænastum, ein og hvør framkomin kommuna eigur at veita.

Vit mugu ikki gloyma tey eldru og teirra tørv, eins og skúlaøki› eisini má fylgja vi›, so hvørt sum vit alla tí›ina gerast fleiri í høvu›ssta›num. Bara fyri at nevna nøkur øki, i› eisini mugu dagførast alla tí›ina.

Vi›víkjandi barnaansingini er nógv meira hent tey seinnu árini, enn fórt ver›ur fram, og eisini eru rættiliga grei›ar framtí›arætlanir á bor›inum, i› skulu tryggja, at framgongd framhaldandi ver›ur á hesum øki.

Eitt nú eru fleiri n‡ggjar kommunalar útstykkingar á veg, og har eru stovnarnir til barnaansingina ra›festir so frammarlaga, at fyrsta hús í hesum útstykkingum er júst ein slíkur stovnur.

Ta› vil siga, at tørvurin á hesum øki longu er nøkta›ur, tá tey fyrstu húskini kunnu flyta í n‡ggju hús síni!

Ungu barnafamiljurnar eru sera t‡›andi partur av borgarunum í høvu›sta›num, og tí eiga vit sjálvandi at taka hædd fyri tí tørvi, hesar familjur hava, so óttin fyri vantandi ansingarplássum ikki skal oy›ileggja gerandisdagin.

Hetta ver›ur longu gjørt, og ta› fer eisini í framtí›ini at ver›a gjørt í uppaftur størri mun, tí viljin sær jú ikki út til at tróta.

Eingin b‡rá›slimur kann einsamallur loysa ella taka sær æruna av at loysa stóra ansingartrupulleikan, men mín partur skal i› hvussu er ikki liggja eftir – heldur ikki í framtí›ini!

Fyri at fáa meira at vita um útstykkingarætlanina í Hoyvíkshaganum, vitji› heimasí›uni www.hemorten.com



## VI‹MERKINGAR

# Ta› skal vera gott at blíva gamal

**Elin Lindenskov,**
*b‡rá›slimur*
*www.lindenskov.com*

Bústa›arvi›urskiftini hjá eldru borgarum í Tórshavnar Kommunu eru sera vánalig.

Serliga er tørvur á ellis- og røktarheimsplássum. Ellis- og røktarheim eru landsmál burturav. Fyri Su›urstreymoyar øki› er hetta sera óheppi. Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum, hevur sagt, at helst ongar iløgur skulu gerast í mi›sta›a›ar økinum, langt fram í tí›ina, tí sambært honum er ov nógv arbei›i í gongd her. Hetta hóast ein kanning, sum bleiv gjørd m.a. av bústa›armøguleikunum hjá eldir borgarum í Tórshavnar Kommunu, vísir at her er tørvur á eini 60 - 80 røktarheimsplássum beinanvegin.

Av tí at vit ikki kunna vænta naka› frá landsins sí›u, keypti kommunan eini sethús í Hoydølum, sum eftir eina umvæling er blivi eldrasamb‡li til 9 fólk. Í løtuni ver›ur atbeitt vi› at projektera eitt eldrasamb‡li vi› Vallalí›. Har ver›ur pláss fyri 16 senil-dementum fólkum.

Kommunan hevur saman vi› Íbú›argrunninum keypt eina ogn Undir Pisuvar›a , sum nú ver›ur umvæld, til nakrar eldraíbú›ir.

Eldraáliti› frá desember 1999 er eitt sera gott grundarlag undir einum virknum eldrapolitikki í Tórshavnar kommunu. Vit í Javna›arflokkinum vilja framhaldandi virka fyri at eldraøki› gerst kommunalt mál, solei›is at vit veruliga kunna reka eldrapolitik í kommununi. Tórshavnar kommuna skal gerast ein gó› kommuna at gerast gamal í. Vilt tú eldru borgarum væl, so er at atkvø›a fyri lista C.

# Kavatænastan í Havnar kommunu

**Hans Biskopstø**
*valevni fyri Fólkaflokkin*

Veturin stendur nú fyri durum, og borgararnir gera seg til rei›ar vi› vetrardekkum og lyktakanning. Og kommunan hevur ambo› til rei›ar at grava vi›, tá i› kavin kemur. Serligur dentur ver›ur lagdur á høvu›sgøturnar og bussrei›irnar.

Men hvat vi› teimum, sum eru til gongu, og hvat vi› sí›ugøtunum?

Her er naka›, sum kann gerast betri.

Ofta ver›ur kavi grivin av koyribreytini inn á gongubreytina, fyri sí›ani at ver›a liggjandi har. Og sí›ugøturnar mugu ofta bí›a alt ov leingi eftir at ver›a grivnar fyri kava.

Fyri at bøta um hetta, eigur kommunan at útvega sær fleiri smærri gravimaskinur til at rudda gongubreytir og sí›ugøtur. Ikki bara í mi›b‡num, men eisini í útja›aranum, tí allir borgarar hava sama rætt til at fer›ast trygt.

Fólkaflokkurin fer at gera naka› vi› hetta máli›.

# Hví politisk uppstilling?

Vit undirrita›u valevni hjá lista c javna›arlistin, bjó›a okkum fram sum valevnir til kommunuvali› ár 2 túsund.

Hetta kommunuvali› skuldi blíva søguligt á tann hátt, at hetta bleiv fyrstu fer›, at ta› bleiv stilla› upp partapolitiskt til kommunuval í bygdini.

Hesafer› hava so bara Javna›arflokkurin og Sambandsflokkurin valt at stilla upp partapolitiskt. Hini siga, at teimum dámar ikki at hetta, ja, pástanda, at ta› er beinlei›is ódámligt.

**Vit halda ta› øvugta:**
Vit stilla upp vi› einum erligum hjarta.

Ta› er munandi meira dámligt at tóna reint flagg. Ta› hevur t‡dning, at vit fáa eina sunna og opna politiska vi›ger› av øllum t‡›andi málum. Ikki bara málum, sum hava vi› tann einstaka b‡lingin at gera, men málum sum hava vi› alla bygdina/oynna og samfelagi› sum heild at gera.

Tak t.d mál sum
- Fíggjarmál
- Umvørvismál
- Kommunualt samarbei›i
- Broytingarnar í kommunubygna›inum
- Ávirkanina, ta› fasta sambandi› vi› meginøki›
- Vinnumál
- Skúlamál
- Eldrarøkt
- Barnaansing
- Ungdómsmál
- Mentan og ítrottarmál

Alt mál, sum hava fyri ney›ini at fáa eina nágreiniliga politiska vi›ger›, bæ›i á›renn vali›, men so sanniliga eisini, tá vali› er fari› afturum, og farast skal til verka av álvara.

Henda vi›ger› eigur ikki bara at fara fram innan teir f‡ra veggirnar á kommunuskrivstovuni, men eisini úti í lokalsamfelagnum av teimum borgarum, sum skulu liva vi› teimum avger›um, sum ver›a tiknar.

Tí halda vit, at ta› er ney›ugt vi› politiskum listum. Tey politisku feløgini eru virkin alla tí›ina, og ikki bara tá val er á skránni, men eisini millum valini. Hetta tryggjar eitt samanhangandi kommunalpolitiskt or›askifti inn í framtí›ina.

Borgaralistarnir eru oftast settir saman vi› tí eina valinum og tí eina málinum fyri eyga . Tá vali› er av, møtast valevnir og stillarar ikki aftur fyrrenn til næsta val, um tey yvurhøvur møtast tá.

Ni›urstø›an hjá okkum er tí tann, at ta› tænir teimum bá›um bygdunum, Mi›vági og Vatnsoyrum best, at stilla› ver›ur upp til kommunuval bæ›i vi› partapolitiskum og borgaralistum.

At enda fara vit at ynskja øllum eitt gott val.

Heilsan

***Valevnini á Lista C***
***Javna›arlistin***
**Jóhannes S. Ellefsen**
**Georg F. Hansen**
**Napolion Magnussen**
**Jonna Hansen**
**Kristoffur Gaardlykke**
**Rúni Olsen**
**Anna Elisa Jacobsen**
**Malan Helgadóttir**

# Nalvasko›an ella b‡rá›sarbei›i

**Leivur Nygaard,**
*valevni á Samgongulistanum á Tvøroyri*

At hyggja eftir hvat hinir hava gjørt — ella heldur, ikki hava gjørt — at líta aftur á gamlar syndir og mistøk, sjálvrós v.m. tykist at vera besta valagni› hjá ávísum valevnum. Neyvan bíta veljararnir á hetta vána agn, og ta› tykist bíligt, bert at bor›rei›a vi› slíkum oftani ósannindum og veruleikareingingum. Onnur mál eiga at ver›a ra›fest fremri.

Hóast eg eri valevni› til b‡rá›svali› hesufer›, fari eg ikki at n‡ta høvi at spilla onnur valevni út ella at stinga tey í ryggin. Haldi ikki, at hetta førir til naka›, og eg fari ongantí› at n‡ta útspilling og persónligt agg til at føra meg sjálvan fram í ljósi›. Hetta er ódámligt, og ein skal ver›a rei›iliga skuldarleysur sjálvur.....

A›almáli› — ta› sum allir b‡rá›spolitikarir og valevni skuldu sett hægst, er samstarv tvørtur um politisk mark. Ta› er tí hugstoytt, at valevni nú rópa um samstarv, tá teir søgdu nei takk, tá ta› stó› teimum í bo›i. Einasta rætta var, um bert tann eini vallistin var til b‡rá›svali›. Máli› má ver›a ta› sama — at arbei›a fyri plássinum og teimum borgarum her búgva. Markleyst er ta›, vit kunna gera, bert vit standa saman.

**Skuldin**
Skuldin hjá Tvøroyrar Kommunu er risastór, og er um at køva allan frambur› á plássinum, men seinastu árini er rættiliga nógv ni›urgoldi›. Um árslok 2000 ver›ur skuldin um 130 milliónir ella einar 3 — 4 álíkningar. Um ta› letur seg gera, og heldur enn at standa vi› húgvuni í hondini, og ver›a spotta›ir av restini av landinum, áttu vit at sagt nei takk til saneringina, og goldi› skuldina sjálvir.

Tá kundu vit enn einafer› rætta ryggin og sagt, at vit hava goldi›, ta› vit hava n‡tt. Hetta ljó›ar kanska djarvt, men eg ivist onga løtu í, at vit høvdu megna ta›, um vit stó›u saman um ta›. Ta› hev›i, um ni›urgjaldingin heldur fram sum nú, tiki› eini 6-8 ár at komi› ni›ur á eina rímuliga, um ikki onga, skuld. Uttan iva ver›ur ta› strævi›, og nógv má helst útsetast, men ein stór uppliving hev›i ta› veri›, at sloppi at goldi› seinasta avdráttin vi› egnum pengum. Tvørafólk hava saman tiki› so mangt ódnartaki›, og hev›i ivaleyst megna og vilja hetta vi›.

**Tekniska stø›an**
Tekniska stø›an í b‡num er sum heild vánalig. Her er brúk fyri peningi, nógvum peningi, til útbygging og vi›líkahald av so at siga øllum ognum B‡rá›sins. Stóru bygningarnir eru í sera ringum standi. Vegirnir út av lagi vánaligir og í stø›um lívshættisliga smalir. Atløgubryggjan á Tvøroyri er alt ov lítil og partar av henni eru um at smokka saman. Drekkivatni er bert reint í pørtum av b‡num, stórur tørvur er á parkeringsplássum í mi›b‡num - og vit ganga undir í sey›alorti har slíkur ikki eigur at finnast. Partar, stórir partar, av b‡num eru sera óruddiligir og ótrivaligir, og er ta› skomm at ikki meira ver›ur gjørt vi› hetta. Hygg eftir økinum vi› gomlu bedingina til dømis.

Alt rætta alt hetta krevur risastórar íløgur. Her má ra›festast og ein langtí›aríløgurætlan má gerast, har sett ver›ur út í korti›, hvussu fram skal farast.